# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Til minnis um Jógvan Norðbúð

Jógvan Norðbúð er nú farin bert 58 ára gamal. Hóast tú visti, hvør støðan var og hvønn vegin tað bar, tá hugsað verður um, ta herviligu sjúku, hann bardist við, so komu deyðsboðini kortini henda vakra sunnumorgunin 7. mai tær dátt við. Mær untist at arbeiða saman við Jógvani á Reiðarafelagnum tey seinastu átta árini, eftir hann varð settur í starv hjá Føroya Reiðarafelag á vári 1998.

Tað varð okkum í nevndini í felagnum skjótt greitt, hvør fongur var í Jógvani. Hann var nærlagdur í sínum arbeiði sum skrivari hjá felagnum og var sera dugnaligur. Sum tann royndi maður hann var, hevði hann serligt innlit í alt, sum fyrifórst innan fiskivinnuna, og tá ið samráðast skuldi við manningarfeløgini, gjørdist hansari holli kunnleiki og dugnaskapur í talviðgerð og á annan hátt ein av hornasteinunum í samskiftinum við mótpartin, og var hann sostatt við til at skapa loysnir. Jógvan hevði mong álitisstørv, har hann umboðaði vinnuna í fleiri arbeiðsbólkum, eitt nú "Praktiskar fiskiroyndir" og arbeiðsbólki til nýggja eftirlønarskipan. Hann varð eisini valdur í nevndina fyri Fasta Gerðarrættin.

Jógvan hevur verið ein rættiligur profilur innan ítróttarheimin. Hann hevur verið við til at lagt lunnar undir eitt fyrimyndarligt ungdómsarbeiði í KÍ í hansara heimstaði Klaksvík. Hann hevur verið knýttur at fleiri av teimum føroysku fótbóltsfeløgunum og hevur



eisini havt sín leiklut í føroyskari landsliðsvenjing. Hansara mynduleiki og bersøgni vóru væl kend á hesum øki, og hevði hann serligar gávur at eggja sínum spælarum og halda teimum til í leiki.

Jógvan var ógvuliga gávuríkur á tónlistaliga økinum. Mest kendur er hann frá Nicodemus Bólkinum í sjeyti árunum. Hann markeraði seg rættiliga við síni væl ljómandi bass-rødd og serliga fríska sangstíli. Hann var við til at lyfta bólkin á eitt tónlistaligt støði, sum hevur rós uppiborið. Eisini var hann tey seinastu árini við í Ebenezerkórinum og eitt skifti við kórinum Aurora Borealis, í báðum førum brúktur sum solistur. Jógvan hevði eina bassrødd sum fáur, hann hevði oyra fyri teim ymisku genrunum og meistraði at brúka røddina bæði í klassiskum sum rytmiskum høpi. Nú til tað allar seinasta hoyrdist hann javnan í bólki saman við vinmonnum.

At Jógvan hevði stóra viðring millum manna, og at hann var væl umtólktur, sást á skaranum, ið saman var komin til hansara jarðarferð frá Ebenezer. Sigast kann, at hann fekk eina virðiliga jarðarferð, har kórsangurin ljómaði vakurt frá Ebenezerkórinum. Sjálvur hevði Jógvan verið við í hesum kóri tey seinastu mongu árini, hansara áhugi og nærlagni var eisini sjónligt á hesum øki. Dupultkvartettin lívgaði eisini um hesa løtuna við vøkrum songi.

Vit á Føroya Reiðarafelag drýpa høvur og venda okkum til tín Elin og tykkum børnini Poula, Elsa, John og Júst í stóru sorg tykkara. Vit hava tykkum øll í okkara huga og vilja lýsa frið yvir minnið um mann tín og pápa tykkar Jógvan Heinrik Norðbúð við hesum orðunum úr sálmi, sum var honum so kærur, og sum hann heilt kundi taka undir við:

*Í Jesu navni sigi eg*
*tær tøkk, Guð faðir mín,*
*at tú av náði leiddi meg*
*á rætta leið til tín.*

**Føroya Reiðarafelag**
**Jákup Sólstein, formaður**

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Miu Larsen, Tórshavn**, fer úr Landsjúkrahúskapellinum hósdagin 18. mai kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Miu, kunna lata Amnesty International eina pengagávu; konta í pengastovnunum.

**Kaisten Thomas Thomasson** ættaður úr **Fuglafirði**, búsitandi í Reykjavík, andaðist hósdagin 11. mai 69 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Gravar Vágs kirkju, mánadagin 22. mai.

## Tøkk

Øllum teimum, sum hugsaðu um meg 2. páskadag, veiti eg eina hjartans tøkk.

**Heilsan Anna á Argjaboða**

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Zacharias Muller**
vanliga nevndur Sakin á Klovanum
fyrrverandi keypmaður
Porkeri

andaðist tórsdagin 18. mai, 96 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi
leygardagin 20. mai kl. 17.00.

Jarðarferðin verður úr Porkeris kirkju
sunnudagin 21. mai kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Sonja, Elna, Daniel Jacob og Signa**

*Tey, ið vilja minnast Zacharias við blómum ella kransum, kunnu í staðin lata eina peningagávu til Missiónshúsið í Porkeri.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, ið vístu samkenslu,
tá okkara elskaða kona, mamma, vermamma
og omma

**Nancy Werning**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.

Hjartaliga tøkk til tykkum mongu, sum ringdu, vitjaðu
og á annan hátt veittu okkum troyst og ugga.
Hjartaliga tøkk fyri talur, sang og troystarrík orð
í kapellinum og til jarðarferðina.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.
Serstøk tøkk til tykkum í Salem, sum skipaðu so væl
fyri ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Salem.

**Henry og Fía**
**Hans Pauli og Anita**
**Rókur, Rósa og Viberg**

**Dagurin**

**20. mai. Angelica.** Teir kenna onga halga konu við hesum navni.

**21. mai. Helena**, deyð ár 329. Hon var mamma Konstantin keisara. Grikst navn, ið merkir kyndil.

**22. mai. Castus**, deyður umleið ár 250. Saman við øðrum brendur á báli í Kartago.

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu
í stóru sorg okkara, tá elskaði sonur okkara,
beiggi, ommu og abbasonur

**Martin Pálsson Arge**

so brádliga varð tikin frá okkum og jarðaður.

Tøkk til øll tey mongu, ið fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til tykkum øll, sum vóru um okkum, fyri heilsanir,
gávur, kransar og blómur.
Tøkk fyri troystarrík orð og vakran sang og tónleik
í kapellinum, kirkjuni og á grøvini.
Ein serlig tøkk til floksfelagarnar í 3A
á Venjingarskúlanum og foreldur teirra
og øll tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini.

Hjartans tøkk øll somul.

**Sunniva, Páll og Jón**